# Stuttligt trøllashow í Runavík



*Trøllaomman var í hopla leygardagin!*

**Leygardagin var ítróttarhøllin í Runavík karmur um eitt stórt familjutiltak við Trøllapæturi, sum mentanarvikan skipaði fyri. Umleið 700 børn, ung og vaksin komu til tiltakið, sum var sera væl eydnað**

FAMILJUTILTAK

*Lív Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*

Mentanarvikan, sum var í Runavík í síðstu viku, hevur havt nógv á skránni; bæði til børn, ung og vaksin. Leygardagin var túrurin kanska serliga komin til børnini, tá ið Trøllapætur og øll hini høvdu eitt stórt trøllashow í ítróttarhøllini í Runavík.

Tiltakið byrjaði kl. 15.00, men longu ein tíma áðrenn stóðu fólk í kø og bíðaðu eftir at sleppa at keypa atgongumerki, og tá ið avtornaði, vóru umleið 700 fólk og hugdu. Har vóru líka nógv vaksin sum børn, og tað var ikki sørt, sum tey vaksnu eisini flentu eftir sprellunum hjá ommuni, og eftir politihundinum, sum fór millum beinini hjá Jógvani politisti, við Erlingi aftaná!

Tey flestu børnini sótu pinnastill á gólvinum og fylgdu við í tí, sum fór fram á tí vakra pallinum, sum var settur upp. Summi sluppu eisini at klappa politihundinum, sum var sera fittur og blíður við børnini.

Lagið var gott á bæði vaksnum og børnum, og øll sungu væl við, tá ið kendu sangirnir hjá m.ø. trøllaommuni vóru á skránni. Børnini bæði klappaðu, sungu, dansaðu og flentu.

Framførslan fór fyri tað mesta fram á pallinum; men Trøllapætur og omman runnu eisini undan politistunum niðri á gólvinum millum øll børnini, sum dúgliga eggjaðu teimum at renna enn skjótari, so tey ikki vórðu fangað.

Endin á øllum var, at leikamafian varð fangað, Kári handilsmaður fekk pengarnar hjá sær aftur, og øll vóru glað.

Tá ið framførslan var liðug, komu tveir Bassar á pallin at heilsa upp á børnini, og starvsfólk hjá Føroya Sparikassa góvu børnunum sunkist, ballónir og taskur heim við. – Alt í alt eitt sera væl eydnað familjutiltak, sum øll vóru væl nøgd við.



*Børnini vóru hugtikin av tí, sum fór fram á pallinum.*



*Erling politistur hevði politihundin við*




*Børnini fingu sunkist, ballónir og taskur frá Føroya Sparikassa*

## Feit konsert í Runavík

**Lena, 200 og Týr spældu væl á konsertini, sum var í ítróttarhøllini í Runavík fríggjakvøldið. Konsertin var kryddað við spennandi trendshowi hjá Shop-Inn og Trend Floor**

KONSERT

*Lív Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*

Í samband við mentanarvikuna í Runavík í síðstu viku spældu Lena, 200 og Týr á stórari, ókeypis konsert, sum var sera væl eydnað. Hóast veðrið var ringt, var lagið gott á teimum umleið 900 áhoyrarunum, sum vóru komnir í ítróttarhøllina í Runavík.

Lena byrjaði konsertina við livandi ljósum á pallinum og hugtók við sínum vøkru og fangandi sangum. Næsti bólkur á pallinum var 200, sum skrúvaði ferðina heilt í topp. Tað hoyrdist og sást, at bólkurin var sera væl dámdur millum áhoyrararnar. Týr endaðu konsertina við einum braki við teirra eyðkendu løgum, og øll sungu dúgliga við.

Vegna veður varð mótasýningin, sum skuldi vera í einum telti uttanfyri, flutt inn í høllina, og bleiv ein partur av showinum. Handlarnir Shop-Inn og Trend Floor vístu nýggjasta mótan. Showið hjá Trend Floor var nýskapandi og passaði væl til atmosferuna, sum var í høllini millum framførslurnar hjá 200 og Týr.

Føroya stuttligasti maður, Hilmar Jan Hansen, var frásøgufólk og kom sera væl frá uppgávuni. Millum annað var ein av klassikarunum hjá Hilmar Jan, Tobbi, á skránni.

Alt í alt eitt gott tiltak, sum sambært fyrireikarunum møguliga verður afturvendandi.